# Profetiskir dagar í Føroyum



við David Saunders

Youth With A Mission Føroyar skipar fyri profetiskum seminari/workshop vesturi í Vágum frá fríggjadegi 19. til sunnudagin 21. september 2003 við framhaldi í Havn frá hósdegnum 25. til leygardagin 27. september

"Tosar Gud við meg persónliga, og hvussu kann eg vita hetta?"
"Hvat umfatar profetagávan?"
"Er profetagáva viðkomandi í dag?"
"Hvussu handfara vit profetisku tænastuna?"

Hetta eru bert nakrir spurningar, ið eru tengdir at tí profetisku tænastuni, sum David Saunders kemur at undirvísa okkum í.

Vesturi í Vágum verður byrjað fríggjakvøldið 19. september kl. 19.00 við nátturða á Hotel Vágum og undirvísing í missiónshúsinum Libanon í Sørvági kl. 20.30.

| | |
|---|---|
| ***Kostnaður fyri luttøkugjald, mat og gisting á Hotel Vágum (avmarkað pláss):*** | ***850,00 kr.*** |
| ***Kostnaður fyri luttøkugjald og mat:*** | ***500,00 kr.*** |
| ***Kostnaður fyri luttøkugjald:*** | ***150,00 kr.*** |

Tilmelding á telefon 318097. Tilmeldingin er galdandi tá upphæddin er flutt á konto 164.712.3 í Føroya Banka

Í Havn byrjar undirvísingin í Evangeliihúsinum hóskvøldið 25. september kl. 20.00
**Kostnaður fyri luttøkugjald: 150,00 kr.**
Til ber at tekna seg til døgurða skeiðsdagarnar.
Tilmelding á telefon 318097. Tilmeldingin er galdandi tá upphæddin er flutt á konto 164.712.3 í Føroya Banka

Youth With A Mission Føroyar

# Almannastovan nýggjar avgreiðslutíðir

Frá mánadegnum 1. september 2003 broytti Almannastovan avgreiðslutíðirnar. Telefonirnar verða tiknar og móttøkurnar hava opið hesar tíðir:

**Kl. 9 til kl. 15 allar yrkadagar.**

Øll, ið ynskja at seta seg í samband við Almannastovuna, verða biðin um at venda sær til deildina í avvarðandi øki:
Í Klaksvík fyri Norðoyggjar, á Tvøroyri fyri Suðuroy, í Runavík fyri Eysturoy og í Tórshavn fyri Streymoy, Vágar, Sandoy, Nólsoy, Skúvoy og Hest. Viðtala er í Vágunum hvønn mánadag.

Almannastovan í Tórshavn
Jónas Broncksgøta 27
Postrúm 3096
FO- 110 Tórshavn
Tlf. 35 35 10 · Fax 35 35 11

Almannastovan Norðoya deild
Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296
FO- 700 Klaksvík
Tlf. 45 72 40 · Fax 45 72 41

Almannastovan Eysturoyar deild
Heiðavegur
Postrúm 224
FO- 620 Runavík
Tlf. 44 82 60 · Fax 44 86 40

Almannastovan Suðuroyar deild
Postrúm 58
FO- 800 Tvøroyri
Tlf. 37 16 20 · Fax 37 15 20

Viðtalan í Vágunum
Heilsumiðstøðin
FO- 370 Miðvágur
Tlf. 33 29 80

**Almannastovan**

# Datasamskiftistøkningur



**el & tele**

Vegna vaksandi virksemi innan datasamskifti, søkir el & tele eftir einum dugnaligum og sjálvstøðugum datasamskiftistøkningi.

**Arbeiðið fevnir um**
Design, konfiguratión, uppsetan og support av datasamskiftisloysnum bæði av LAN, WAN, WWAN; WLAN og internet samskiftisloysnum.

Tú skal arbeiða í einum tvørfakligum toymi við 8 starvsólkum, sum arbeiða við data- og telesamskifti. Tín høvuðsuppgáva verður ráðgeving, design og konfiguratión av LAN, WAN, troygdarloysnum og Wireless. Vit nýta veitarar sum Cisco System, Linksys, Nortel Network v.m.

**Krøv til umsøkjaran**
Tú skal hava eina viðkomandi útbúgving so sum datalog, dataverkfrøðingur, DØK, datamatikari, ella líknandi. Hevur tú eina Cisco certificering er hetta ein fyrimunur.

Royndir innan datasamskifti og hollan kunnleika í design, konfiguratión og support av LAN, WAN, troygdarloysnum og Wireless er ein fyrimunur. Tann, ið settur verður skal dáma at fáa nýggjar avbjóðingar, verða nærløgd/ur og strukturerað/ur. Felksibilitetur, intiativ, samarbeiði og sjálvstøða er týdningarmikið, tá ið ein skal arbeiða í einum tvørfakligum toymi. Eisini er samskifti við kundan og starvsfelagar av størsta týdningi.

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum uppgávum
- Eitt áhugavert arbeiðspláss har vit leggja áherðslu á, at halda okkum dagførd við nýggju tøknina.
- Løn eftir avtalu
- Skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Til tíðir er nógv at gera, og tí kann yvirarbeiði væntast.

Um tú hevur spurningar kanst tú venda sær til Sóleyð Hofgaard, rakstrarleiðara.

Umsókn við CV, prógvum og evt. viðmælum, skal vera el & tele í hendi innan 22. september 2003.

**el & tele**
att: Sóleyð Hofgaard
Argjaboðagøta 7 · Postboks 2060
FO-160 Argir · smh@eltele.fo

**el & tele** veitir ráðgeving, design, sølu og tænastur av heildarloysnum innan datasamskifti, tele og el. **Missiónin** hjá el & tele er at menna og víðaribera nýggjastu og fremstu tøknina til kundar okkara. Starvsfólkið hjá el & tele tryggjar hetta, við støðugari útbúgving. Tað eru 16 fólk í starvið hjá el & tele í løtuni.

**Brúktar byrsur**
**í góðum standi verða keyptar**

*P/f Jógvan Weihe*
*Heil- og smásøla*

*Staravegur 15 · Tlf: 31 38 97*
*Fartlf: 21 38 97 · Fax: 31 38 83*
*T-postur: jwimport@post.olivant.fo*
*Heimasíða: www.jogvan-weihe.fo*

# Sjúkraavloysari

Søkt verður eftir sjúkraavloysara til frítíðarskúlaná Oyrarbakka.

Løn sambært sáttmála við Pedagogfelagið.

Áhugað kunnu venda sær til leiðaran á tlf. 228780.

**Frítíðarskúlin**
í Sunda kommunu





# Sethús í Vági til sølu

Sethúsini eru í trimum hæddum, og standa í Toftalið.
Í miðhæddini er køkur og stova. Á loftinum eru 3 kømur, umframt vesi. Í kjallaranum er baðirúm.

Grundøkið: 308 $m^2$
Húsavídd: 48 $m^2$
Úthús: 8 $m^2$

# Grundstykki í Vági til sølu

Matrikul nr. 93$^{c}$, í Toftalíð, Vágur.
Grundøkið: 631 $m^2$

Nærri fæst at vita við at venda sær til Suðuroyar Sparikassa, telefon nr. 373064 ella á heimasíðu okkara www.sparsu.fo

**Suðuroyar Sparikassi**
Postboks 2 · FR-900 Vágur
Tlf. 37 30 64 · Fax 37 33 40

# Sp/f Á-grýtni

**ALT ARBEIÐI INNAN:**

**Timbur**
**HVS** (hita, vatn & sanitet)
**Ravmagn** (el)

**Ring og hoyr nærri til:**

Rólant - tel 21 16 49 ella
Ben Gurion - tel 72 16 48
á kvøldi - tel 42 16 48
ella tel 42 16 49



Sosialurin 341800

**Søkt verður eftir goymslufólki**

**Við møguleika fyri læruplass.**

Vit søkja eftir fólki til fyritøku okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum, umframt aðrar uppgávur.

Er spurningur ella ivamál ringið til okkara á tlf. 315600

Umsókn ynskist til 15. september 2003

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn · www.andreasen.fo

# Pedagogur til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. oktober 2003 (ella eftir nærri avtalu).

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs leiðara á tlf. 225222/444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 17. september kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 2. september 2003

**Fuglafjarðar býráð**

**RYGESTOP**
MED FULD GARANTI!

Nu er det muligt at deltage i et Easyway Rygestopkursus i Tórshavn



Kursusdatoer: 18.9, 19.9 og 20.9

NB! Sidste datoer for nye kursister i år

Tilmelding **inden 8.9.2003** på mette@eassyway.dk eller 004551903536

*Nærmere info på www.easyway.dk*

Allen Carr's Easyway®
Det lette rygestop

*www.easyway.dk*
*tlf. 51903536*

# 10-mannafar og 19 tonsari til sølu

- Nýbygt 10-mannafar til sølu fyri 45.000 kr.
- 19 tonsari Hamranes uttan fiskiloyvi til sølu um hóskandi boð fæst

**Tlf. 44 80 74**

Sosialurin

**HJÁ GUNLEIVI**

# Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læripláss leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakrarlæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. procesteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á teknisk-um skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 22 88 38 ella 31 21 61

**GSM telefonir**
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
**Tráðleysar**
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
**Til skip og bátar**
NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

***Arbeiðshandskar***
***til øll endamál - bæði á sjógvi og landi***

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

Beinleiðis frá framleiðara

**ADC**-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820